# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

*Nú skylda vit so ikki NSÍ nakað*

*Bárður Danielsen, Skála*

# Loysir seg at vera fittur

**Tvær ferðir hevur B36 fingið mann riknan av vøllinum í Gundadali. Báðu ferðirnar hevur úrslitið verið stigamissur. Einsamalt oddalið er nú NSÍ, ið sum einasta liðið als ikki hevur fingið nakra útvísing í ár**



*Runavíkingar hava í ár skikkað sær framúr væl á vøllinum. Ivaleyst er hetta eisini viðvirkandi til góðu støðuna á talvuni, tí enn hevur liðið fyrsta leikbannið tilgóðar*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

FÓTBÓLTUR

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Við fýra umførum eftir at spæla er NSÍ nú einsamalt oddalið. Sjálvir greiddu teir sín setning, tá teir – í vanligum stíli – bíðaðu til evstu løtu, áðrenn sigursmálið varð sent í meskarnar. Hesaferð móti AB.

Umframt oddastøðuna á stigatalvuni er merkisvert, at NSÍ liggur væl og virðiliga ovast á Fair-play listanum. Í 23 dystum hava runavíkingar bert fingið 23 kort, og tað er væl eitt tekin um eitt lið, har menn eru í góðari javnvág við seg sjálvar. Og har fáar kreftir verða nýttar upp á avrikið hjá dómaranum. Og so slepst ikki undan at viðmerkja, at hetta so ofta hevur eyðkent tey lið, sum Jóhan Nielsen hevur vant. Tí umframt so nógvar aðrar venjaradygdir, so er ein av vanunum hjá honum at biðja spælarar um at lata vera við at brúka seg móti dómaranum. Tí sum hann plagar at taka til: Hann hevur ongan tíð broytt eina avgerð kortini!

## Dýru kortini

Tað kynstrið hevur B36 ikki dugað í sama mát. Reyða kortið mánakvøldið var tað triðja hjá liðnum í ár, og øll trý eru tey komin í heimadystum. Móti AB var dysturin avgjørdur, áðrenn Kenneth Jacobsen varð sendur undir brúsuna, men bæði móti KÍ og móti Skála gjørdist talan um stigamissir, tá árstalsfelagið í heilan hálvleik noyddist at spæla undirmannað.

At liðið so kortini hevur fingið stig undir hesum umstøðum sigur tó eisini nakað um, at spælararnir hjá B36 teljast millum teir best trimmaðu í landinum, men eisini hjá slíkum kann mótbrekkan gerast ov tung viðhvørt.

## Botnurin fokin

Umframt tvídystin millum tey bæði oddaliðini, so er reellur spenningur nú bert um, hvørt tað verða HB ella EB/Streymur, sum fara við bronsuni. At HB fær intertoto bólt kortini, er tó longu avgjørt eftir steypasigurin hjá EB/Streymi móti júst HB. Tann sigurin varð endurtikin sunnudagin, og tað gav aftur vón til EB/Streym um, at teir enn einaferð kunnu enda kappingarárið við metalli. Um enn hetta ikki verður heilt so fínt, sum tað varð í fjør.

Í aðrar mátar varð botnurin at kalla staðfestur um vikuskiftið. VB/Sumba hevur ikki longur matematiskan møguleika at lívbjarga sær í bestu deildini, og tí má Suðuroyggin fyribils sláa seg til tols við, at eingin Formula-bóltur verður á oynni í 2008.

Júst sigurin hjá B71 legði eyka trýst á AB, men við tapinum í Runavík eru teir nú mest sum eisini kollsigldir. Tað skal í øllum førum henda nógv, um teir skulu vinna níggju stig aftur seinastu fýra umførini.

## Líkasælan

Tað kann væl geva eina støðu, har nógvir av seinastu dystunum verða merktir av líkasælu. Tí í veruleikanum eru nú bert fýra lið eftir, sum hava nakað at spæla um. Tvey teirra bresta saman í lyklauppgerð í Runavík komandi sunnudag, har vespurnar móti HB skulu prógva, at gummibein ikki fara at gera um seg seinastu umførini. Hinir dystirnir eru B36-AB, KÍ-EB/Streymur, B71-GÍ og VB/Sumba-Skála.

## FAKTA

**Gulldysturin**

**30. september**
NSÍ-HB
B36-AB

**7. oktober**
GÍ-NSÍ
B71-B36

**21. oktober**
NSÍ-VB/Sumba
EB/Streymur-B36

**27. oktober**
B36-HB
KÍ-NSÍ